Tíðin komin at seta hol á

Tvøroyrar Býráð hevur ikki nógv at rumma við, men næsta ár er ætlanin kortini at seta hol á nakrar útbyggingina

TVØROYRI
Áki Bertholdsen

Tvøroyrar Kommuna er enn illa fyri figgjarliga. Men kortini er ætlanin at seta hol á ymsar útbyggingar næsta ár.

Á fíggjarætlanini fyri næsta ár, eru 100.000 krónur settar av til at fyrireika arbeiðið at byggja nýtt næmingaheim í sambandi við Almanna- og Heilsuskúlan á Tvøroyri.

Býráðslimir søgdu, at hetta var ein óbeinleiðis áheitan á Landsstýrið um eisini at seta pening av til at byggja nýggjan skúla fyri.

Býráðið hevur somuleiðis sett 450.000 krónur til at fyrireika arbeiðið at byggja eldrasambýli. Kommunan hevur fyrr ætlað at byggja eldrasambýli inni í Trongisvági, beint uttanfyri ringvegin við Ítróttarhøllina og tað er framvegis einasta stykki, sum er upp á tal.

Harumframt verða 300.000 krónur settar av til at gera høli hjá tannlæknanum ístand fyri, so at tannlækni aftur kann setast niður á Tvøroyri, tí tað hevur tað stórur saknur í. Somuleiðis verða 300.000 krónur eru settar av til Kirkjugarðin og 100.000 til nýggjan sløkkiliðsbil.

Tað verða eisini 950.000 krónur settar av til at fylla út niðri á havnalagnum. Havnalagið er ov trongt sum er og tí er tað neyðugt at rúmka ræsurnar.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri, sigur, at enn er ikki gjørt av, hvar fyllast skal út.

Men vesturi við flakavirkið hjá Delta er grynri enn uttanfyri Fiskavirking so har røkkur peningurin longri.

Hann ásannar tó, at økið, sum fæst fyri 950.000 krónur, verður ikki stórt, men tað verður tó pláss fyri einum hampiligum bygningi.

Í løtuni hevur kommunan ongar umsóknir um grundstykki til vinnuvirki, men skuldi ein komi, vil kommunan helst hava eitt stykki tókt.

Tvøroyri er enn tyngd av stórari skuld, men næsta ár er kortini ætlanin at seta hol á nakrar útbyggingar

42,6 milliónir inn í skatti

Annars væntar kommunan at fáa 44,1 milliónir inn í kommunuskatti í komandi ár og tað er 5,7 % meiri enn fíggjarætlanin í ár vísir, ella tvær milliónir meiri.

Men kommunuskuldin er framvegis stór, og næsta ár skal kommunan betala 16.4 milliónir í rentum og avdráttum.

Skattaprosentið á Tvøroyri næsta ár, verður óbroytt, 22,5% og barnafrádrátturin verður somuleiðis tann sami, 3.000 krónur.

Annars hevur tað gingið upp og niður hjá Tvøroyri seinastu árini. Í fjør varð mett, at kommunan fór at fáa 40 milliónir inn í skatti í 2000, men tað komu 44 inn. Í ár vórðu mettar at fáa 42 milliónir inn, men, og spurningurin er um tað fer at halda, so í ár eru inntøkurnar falnar, afturímóti í fjør. Næsta ár verður so aftur roknað við einumn vøkstri.

Skuldin hjá Tvøroyrar kommunu er einar 100 milliónir í løtuni og eftir teirri avtalu, sum nú minkar hon einar 10 milliónir um árið, Tvs, at um fimm, seks ár er hon komin niður á eina álíkning.

Á Tvøroyri vilja tey hava sín part av kakuni

Tvøroyrar Kommuna vil nú hava vørugjald av tí farmi, sum verður fluttur av oynni við Smyrli, ikki minst útflutninginum av fiski, og av tí farmi, sum kemur til oynna við Smyrli

TVØROYRI
Áki Bertholdsen

Tvøroyrar kommuna er nú farið at kanna, um tað ber til at krevja vørugjald av tí farmi, sum fer úr Suðuroynni og kemur í oynna við Smyrli.

Hetta varð samtykt á býráðfundi í farnu viku.,

Tað var umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu, sum spurdi Býráðið um hon ikki skuldi kanna møguleikan fyri at krevja vørugjald av tí farmi, sum fór um bryggukantin á Tvøroyri við Smyrli.

Tað hevði býráðið onki ímóti og tað varð einmælt samtykt.

Men samstundis mæltu býráðslimir til at vísa størsta varsemi, tí hetta mátti ikki merkja, at eykagjøld verða løgd á vinnulívið í oynni.

Tað gjørdi býráðið sær greitt at tað ikki skuldi.

Orsøkin til hetta uppskotið er ein alsamt veksandi misnøgd við, at Tvøroyrar Kommuna als onki fer í vørugjaldi av øllum tí farmi, sum verður fluttur úr Suðuroynni og tí farmi, sum verður fluttur í oynna við Smyrli.

Kommunan fær heldur ikki eitt oyra í vørugjaldi av øllum tí fiski, sum verður virkaður í Suðuroynni og sum síðani verður fluttur av landinum um bryggjukant á Tvøroyri, fyrst við Smyrli til Havnar og síðani av landinum.

Ístaðin stendur Havnin sum avskipingarhavn og tí er tað Havnin, sum fær alt vørugjaldið.

Somuleiðis fær Tórshavnar Kommuna vørugjaldið av øllum farmi, sum kemur til Suðuroyar við Smyrli.

Smyril førir nógvan farm ímillum Suðuroynna og Havnina, men tað er Tórshavnar Kommuna sum fær allan ágóðan av tí, meðan Tvøroyrar Kommuna ikki fær eirr oyra og tað verður ikki longur góðtikið á Tvøroyri

Nógvur peningur

Á býráðsfundinum á Tvøroyri varð ført fram, at tað var ikki sørt av peningi, sum Tórhavnar Havn fær í kassan við vørugjaldi, sum annars onki hevur við Havnina at gera, men sum er fyri farm, sum skal í aðrar partar í landinum, ella sum kemur úr øðrum pørtum í landinum.

Býráðslimir, sum hava sitið leingi, søgdu, at hetta er ein spurningur, sum hevur verið uppi av og á, men hann var sovnaður burtur aftur hvørja ferð.

Eitt nú hevði málið verið til viðgerðar í Felagnum fyri Føroyskar Havnir fyri nøkrum árum síðani, men har var onki hent, tí tær stóru kommunurnar, sum høvdu fyrimun av hesum og fingu alt vørugjaldi, eitt nú Tórshavn, Runavík og Klaksvík, høvdu barst ímóti við hond og fót.

Eitt uppskot, sum hevði verið frammi, var at áleggja Strandferðsluni eitt eyka vørugjald, sum kommunurnar kring landið skuldu fáa, tvs at landið skuldi betala, men tað datt eisini niðurfyri.

Býráðslimir hildu tó, at rákið var við at venda, tí útflutingur og innflutningur varð meiri og meiri miðsavnaður um Havnina, so at tað kanska blivu fleiri og fleiri kommunur, sum høvdu áhuga í at fingið viðurskiftini broytt.

Tí var semja í Tvøroyrar Býráð, um, at rætta løtan er komin til at taka málið upp aftur.

Pedagogarnir góðan sáttmála

– Okkara størsta ynski var at fáa eina nýggja lønartalvu fyri allar okkara limir, har umflokkingar og lønarhækkingar vórðu lagdar inn. At tað er eydnast eru vit ómetaliga glað fyri, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag

VERKFALLIÐ
Turið Kjølbro

Tað eydnaðist loksins hósmorgunin nakað áðrenn klokkan sjey pørtunum í verkfallinum hjá pedagogunum at koma fram til eina semju og undirskriva nýggjan sáttmála. Føroya Pedagogfelag øðrumegin og Fíggjarmálastýrið, Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hinumegin sótu í 70 tímar út í eitt og samráddust um nýggjan sáttmála fyri teir 1000 limirnar í Føroya Pedagogfelag.

Nýggi sáttmálin er galdandi afturvirkandi til 1. mars í ár og tvey ár fram. Lønarhækkingin í nýggja sáttmálanum er 12 prosent. Í nýggju lønartalvuni, sum kemur í gildi 1. mars næsta ár, eru lønarhækkingar og umflokkingar við. Talvan fatar um allar pedagogar, men ein serlig lønartalva er gjørd fyri teir umleið 100 pedagogarnar, sum eru tænastumannasettir.

– Áðrenn vit fóru undir samráðingarnar ivaðust vit onga løtu í, at tað var rætt at samráðast við allar partar undir einum. Nú ivast vit í, um tað er rætti mátin, sigur Carita Björklund

– Okkara størsta ynski var at fáa eina nýggja lønartalvu fyri allar okkara limir, har umflokkingar og lønarhækkingar vórðu lagdar inn. Viðbøturnar eru lagdar inn í lønina, soleiðis at tær eru eftirlønargevandi, og sáttmálin er sum heild væl ruddiligari og einfaldari enn áðrenn. At hetta er eydnast eru vit ómetaliga glað fyri, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.

Krav frá Føroya Pedagogfelag var eisini, at dagrøktarleiðarar verða løntir sum dagstovnaleiðarar. Hesum ynski gekk mótparturin hjá Pedagogfelagnum á møti í ein mun, tó ikki heilt í so stóran mun sum Pedagogfelagið ætlaði.

Serskipan

Eftir, at samráðingarnar slitnaðu seinast, førdi Fíggjarmálastýrið fram, at tað bar ikki til at fáa tænastumannasettu pedagognarnar í somu lønartalvu sum hinar pedagogarnar.

– Tænastumannasettu pedagogarnir eru í serligari støðu, orsakað av eftirløn, flokkingum og øðrum viðurskiftum. Fíggjarmálastýrið vísti á henda trupulleikan og vit ásannaðu, at tað bar ikki til at fáa teir í somu talvu sum hinar limirnar.

Samráðingarnar gjørdust rættiliga drúgvar, og tað komst eitt nú av, at land og kommunur skuldu koma ásamt um, hvussu stóran part av sáttmálanum hvør skal bera. Hetta roknistykkið, sum í grundini einki hevur við Føroya Pedagogfelag at gera, tók eftir øllum at døma drúgva tíð.

Eftirmeta

Verkfallið, sum vardi í tvær og eina hálva viku, hevur rakt hart nógva staðni. Ikki minst á serstovnum og døgnstovnum, har fólk við serligum tørvi búgva, og avvarðandi og felagskapir hava víst sína misnøgd.

– Tað hevur sjálvsagt ikki verið gott at vita, at tað hevur verið tungt og strævið nógva staðni. Nevndin í Pedagogfelagnum fer nú saman við álitisfólkunum at viðgera spurningin, um hetta skal verða mannagongdin frameftir, at pedagogar á serstovnum eisini skulu í verkfall. Hetta er jú fyrstu ferð, at serstovnarnir verða raktir av verkfalli hjá Pedagogfelagnum.

Vøggustovur og barnagarðar hava í ár verið rakt av trimum verkføllum. Í tveir dagar í mars vóru stovnarnir stongdir orsakað av verkfalli hjá Føroya Pedagogfelag, síðani aftur orsakað av verkfallinum hjá vaskifólki í nakrar vikur, og aftur nú í góðar tvær vikur. Spurningurin er so, um verkfall verður gerandiskostur í framtíðini.

– Tað kann eg ikki ímynda mær, men vit kunnu ásanna, at politikkurin mótvegis fakfelagsrørsluni er harðrendur, og vit hava kent ein illvilja ímóti felagnum, og serliga ímóti ynskinum at fáa eina lønartalvu.

– Hinvegin hevur árið í ár verið serligt, ikki minst tí vit hava havt samráðingar við so nógvar partar. Áðrenn vit fóru undir samráðingarnar ivaðust vit onga løtu í, at tað var rætt at samráðast við allar partar undir einum. Nú ivast vit í, um tað er rætti mátin, tí tað hevur verið ómetaliga drúgt og strævið. Mótparturin hjá okkum skal jú eisini vera samdur innanhýsis, sigur Carita Björklund.

Jólaljómur báðu megin fjallið

Glymur úr Havn og Kórið Sólarmagn, mannað við kirkjubøingum og velbastaðmonnum
Mynd: John Dalsgarð

Havnarmenn, kirkjubøingar og velbastaðmenn syngja jólini inn

Leygardagin verður jólakonsert á Velbastað og í Havn. Tað eru kórini bæði Glymur og Sólarmagn, sum hava kastað pjøkarnar saman til hesa kórferð í Suðurstreymi. Leiðarar í kórunum eru ávikavist Palli Hansen og Fróði Sandoy.

Skráin er blandað. Jólatónleikur hevur sum vera man yvirvágina, rútmiskur eins og klassiskur. Kórini syngja fyrst hvør sína skrá. Kórið Sólarmagn syngur føroyskar og enskar jólasangir. Eitt av verkunum hava J.S. Bach og Finnbogi Ísakson skrúvað saman. Glymur hevur umframt jólasangir eisini verslig verk á tungu, millum aðrar verða Martin Joensen og Mark Knopfler tulkaðir. Onkur løgin haitiskur sangur verður at hoyra. At enda fara allir hálvthundrað sangararnir at framføra í sátt og semju og sælum jólahýri. Fyrst gæliskan sang um kyndlagongu og síðani Eg rósu upp sá næla, sum J. Dahl týddi úr týskum. Áhoyrarar fáa eisini høvi at syngja við í einum kendum jólasangi.

Kórini bæði leggja fyri í skúlanum á Velbastað klokkan 16.30. Síðani fara tey yvir Háls og herðar til Havnar at syngja í kommunuskúlahøllini, klokkan 19.00 sharp. Konsertin varir ein tíma og kostar 60 krónur fyri vaksin, einki fyri børn.